var upprunaliga at seta inn beinanvegin — og hava ein mann bert til eftirlit. Men tað var dýrt, og tí varð tað kombinerað við annað. Hann upplýsti, at tiltakið varð lagt soleiðis upp, at mjólkarvirkið leigaði ein mann frá búnaðarfelagnum við víðari arbeiði í huga. Og ynskti bóndin — eftir kanning — at fáa brek rætta, so fór maðurin yvir til starv hjá búnaðarfelagnum.

Hanus Vang upplýsti, at prísurin verður ikki »dumpaður« fyrstu ferð, mjólkin fer niður í 2. floks mjólk og helt, at tað kundi ikki vera rætt, at mjólkarvirkið fór at taka upp kapping við búnaðarfelagið og fór undir umvælingararbeiði.

□

# Hvat er gjørt, og hvat eigur at verða gjørt fyri tað føroyska rossaslagið?

**ENDURPRENT ÚR BÚNAÐARBLAÐNUM 1903:**



*M. W. Lützen var landbúnaðarráðgevari í mong ár og stjórnaði fleiri búnaðarbløðum og hevur m. a. skrivað hesa grein.*



**Frá stóru kriatúrsýningini í Havn í tjúgunum. Mynd: Carl Johan Bech.**

1885 sendu Just Jakobsen, A. W. Restorff, R. C. Effersøe og J. Petersen bønarbræv til løgtingið um at gera nakað fyri tað føroyska rossaslagið, sum tá var í sterkari afturgongd, serliga tí at tey besti rossi blivu seld út av landinum, og at ein og hvør graður hestur bleiv brúktir til springhest, hvussu hann var skikkaður.

Sakin bleiv útsett til næstu tingsamling, og í 1886 bleiv tað lagt amtmanninum upp í hendur, at fáa í lag eitt lóguppskot til frama fyri rossadriftina. Málið hvíldi tá í nøkur ár til 1890. Tá kom aftur bønarbræv frá Førja bóndafelag til løgtingið, um at taka sær av rossarøktini, sum tá var enn meir gingin aftur á hondina síðani 1895. Ímillum annað sigst frá í hesum bønarbrævi, at í øllum Eysturoya sýsli var ikki ein graður hestur, sum nýtast kundi til springhest.

Við bønarbrævinum fylgdi eitt lóguppskot, sum gekk út uppá, at eingin graðhestur skuldi ganga leysur, uttan hann var sýnaður av eini 3-mannanevnd og hildin at vera góður.

Eftir hesum uppskoti gjørdi løgtingið eina lóg, sum bleiv góðkend 30. mars 1892, og sum er tann einasta lóg, vit hava fyri rossahaldi, umframt tað, í hagalógini stendur.

Til løgtingssamlingina í 1900 sendi útgevarin av hesum skrifti bønarbræv til løgtingið, um at gera nakað munaligt til frama fyri rossaalingina, soleiðis at okkara egna rossaslag kundi ganga framm ímóti at blíva eitt dugandi arbeiðsross, soleiðis sum tað føroyska jarðabrúkið kemur at krevja tað so við og við, og deils so at ein onnur grein av tí kundi útviklast hin vegin, til at blíva ein eftirspurdir hestur til ta lættasti koyring uttanlands.

Tingið helt sakina soleiðis framborna ikki hava so avgerandi nógv at siga fyri landið, at tað vildi leggja væl av peningi til, fyri at fremja málið, og júst tá stóðu eisini fyri peningaútlegg til hendan seinast keypta norska hestin »Grana«, men skuldu tó hava fyri eyga at veita peningastudning til menn, sum royndu at hava tey bestu rossini til alidýr her í



**Vágaross næst føroysku rótini. Mynd: Kalmar.**

landinum, og hartil bleiv búnaðarráðgevarin (landbrugskonsulenten) biðin um á sínum ferðum um landið árið eftir — 1901 — at velja út tvær ryssur og ein hest av teimum bestu, hann kundi finna, og vissa teimum



**Kríatúrsýning í Havn 1926. Mynd Carl Johan Bech.**

at blíva í landinum, um neyðugt gjørdist, at veita nakað lítið av peningi til tað, so tingið í síni næstu samling aftur kundi taka sakina framm.

Men aftur er her eitt dømi uppá, at tað ikki nyttar heilt at leggja eina sak í almanna hendur, tá hon ikki verður stýðja í vinnilívinum.

Búnaðarráðgevarin hevur einki gjørt fyri sakina, og løgtingið líka lítið.

Men málið um at lívga um okkara ross, hækka virðið á teimum og fáa meir av teimum, hevur eina aðra síðu, og tað er *blanding við útlendsk blóð,* fyri í stutta tíð at gera okkara rossaslag størri og meir dugandi til sleipiross í jarðabrúksins tænastu.

1890 kom til Kirkjubøar tann fyrsti útlendski hesturin av tí norska fjarðaslaginum »Ørvaroddur«. Meðan tey føroyski rossini eru um 7 kv. høg, var hann um 9 kv.

Hann bleiv nakað nógv brúktir til ryssur í Suðurstreymoy, Kirkjubø, Havn og Dølunum, og eru rossini undan honum væl størri enn tað óblandaða føroyska slagið.

Úr øllum hesum støðum er slag undan honum komið víða hvar um oyggjarnar, mest í Sandoy og Vágum.

Hann datt oman 1898.

1900 kom annar útlendski hesturin av sama norska slagi »Grani« til landið, keyptir av tí almenna, er Førjars ogn og hevur staði í Kirkjubø, síðani hann kom.

Hann er væl minni enn »Ørvaroddur«, væl 8 kv., og meðan »Ørvaroddur« var brúnur av liti, er hesin ljós reyður.

Undan honum er einki slag komið enn.

Tað sum hugsan var við hesu blanding, var í stutta tíð at vaksa um okkara ross, so tey kundu vera sterkari til arbeiði og meir hóskandi til ta nýggju jarðabrúksdrift, sum stendur fyri at førast inn í land okkara, og tað vísti seg brátt, at slagið var væl valt, tí tey ross, sum fallin eru undan »Ørvaroddi« og føroyskum ryssum, eru størri og sterkari enn tað óblandaða føroyska slagið.

Men eitt norskt ross er ikki eitt føroyskt ross.

Rossini, sum øll onnur alidýr, eru framkomin av tí jarðabrúki, tey vera ald upp av, so frammarlaga sum jarðabrúkið stendur, stendur eisini rossaslagið.

Jarðabrúksdriftin í Noreg er væl framkomin og hevur góð kor at bjóða sínum rossum og øðrum krýatúrum. Livikorini hjá tí norska hestinum eru nú rættiliga góð, og tað verður nú so nógv gjørt fyri hann, at hann hevur tað javnt alt árið runt.

Fjøldin av teimum føroysku jarðabrúkarum hevur enn ikki sítt brúk skipað soleiðis, at tað kann bjóða nøkrum útlendskum rossaslagi tey livivilkor, sum rossið í sínum heimi er vant við, og tað vilja enn ganga ár, ja nógv ár, áður jarðabrúkið í Førjum er komið so langt, at tað kann bjóða sínum rossum jøvn góð livikor alt árið runt.

Tá ein brádlig umbroyting av jarðabrúks- og umsetningsviðurskiftum stendur fyri, soleiðis sum tað nú sýnist at vera í Førjum, liggur tað fremst fyri eisini at broyta krýatúrini, og tað fyrsta, sum tá altíð hevur verið tikið til, er at blanda tað heimliga slagið við einum útlendskum betri slag.

Men sum áður er nevnt, hetta útlendska krýatúrslagið er ikki vant við tey livikor, sum bjóðast teimum. Tey hava ilt við at venjast við staðið, veðurlagið og alt hetta nýggja, sum bjóðast teimum, og oftast, fyri ikki at siga altíð, koma fleiri vansar at vísa seg við innflyting av einum slagi, enn ein av fyrstin tíð trýr, og nógv dýrari er hesin mátin eisini.

Flest øll lond hava við byrjan av sínum arbeiði fyri bøting av teimum ymsu krýatúrsløgunum brúkt hendan mátan at føra inn útlendsk blóð, men flest alla staðnis eru teir gingnir burtur frá hesum mátanum og tikið hond í sítt egna heimliga slag, eftir at teir hava kostað nógvan pening, og havt nógv tap av arbeiðinum við tí útlendska slaginum.

T.d. skal nevnast tað jútska

neytaslagið, sum í nógv ár bleiv blandað við útlendsk sløg fyri at fremja mjólkievnini, men til onga nyttu; nú hava jútarnir tikið fastatøkur aftur á sítt egna slag, og hava av tí fingið frálík mjólkneyt í stutta tíð. Á sama hátt gekk í Noreg, har teir í 30-40 ár eftir fastari plan royndu at skapa sær góð mjólkneyt við innblanding av einum góðum útlendskum neytaslagi. Teir høvdu bara tap og forargilsi av tí, men í hesu seinastu 15-20 árini hava teir víða hvar í Noreg fingið góð mjólkneyt av sínum heimligu sløgum.

Í Noreg hava teir tvey rossasløg, eitt á eystlandinum, og eitt á vestlandinum. Hin eystari hesturin er størri og kostar meir; á einum tí besta fjørði á vestlandinum hava teir fingið sær eystlandshestar fyri at hækka virði á sínum slagi. Teir fingu væl hestin størri, men hann bleiv óskapligur og kom ikki í prís móti teirra egna slagi. Soleiðis kunnu nevnast nógv dømir.

Eftir hesa stuttu tíð, royndin við innblanding av norskum blóði í okkara rossaslag hevur varað, at fella nakran dóm yvur, um tað er gott ella ikki, kann ikki gerast, men her skal vísast á stak dømir, sum sýna, at eisini við hettar arbeiði eru misligheitir, sum tað er best í tíð at geva gatir.

Tann fyrsti norski hesturin kostaði 2-vetur 900 kr. Árligt fóður til hann var 2-300 kr.

Ta tíð, hann livdi her (ca. 9 ár), fullu undan honum 30-40 fyl, sum komu til fullan aldir, og hvørt av hesum hevur eftir okkara rossaprísum 40-50 kr. meiri virði, enn føroysk ross. Hettar er lítið fyri peningin, fyri ikki at siga tap.

Aftrat hesum kemur:

Tað hevur víst seg, at fyldeyðin hevur verið stórur millum hettar slagi.

Ryssurnar av hesum blandaða slaginum hava flest allar tann stóra feil, at kasta síni fyl burtur væl halvgingnar, og hartil tola blandingsrossini ikki okkara veðurlag so væl sum tey føroysku rossini, men eru rak um várið.

Alt hettar hevur givið eigarinum av hesum blandaðu rossunum nógv tap og fortreð, so nógv kannska, at tað vegar fullt upp móti tí størri arbeiðsevni, hesu rossini hava; men sum sagt, enn kann eingin avgerandi dómur fellast.

Hesin nýkeypti norski hesturin



Vágaross. Myndir: Kalmar.

»Grani« vísir seg at vera so eyman, at hann bleiv rak fyrsta summari, hann var í haganum.

Meðan hettar arbeiði fyri at bøta um okkara rossaslag, sum kannska eingin bót er, hevur gingið, er einki gjørt fyri at bøta um tað føroyska rossið í sær sjálvum, uttan lógin av 30 mars 1892, so tað kann ikki vitast enn, hvat eitt slíkt arbeiði kundi ført til, men tað eru nokk av dømum frá útlandinum at taka framm, at eitt krýatúrslag kann broytast nógv á tann hátt, man vil, og í stutta tíð, uttan at blanda við útlendsk blóð, soleiðis sum áður nevnt, og væl má minnast, at okkara ross er blivið sum tað er av teimum viðurskiftum, Førja jarðabrúk hevur boðið tí, og javnt við, sum jarðabrúkið gongur framm á, kann tað bjóða sínum rossum betri livikor og hava meir umhugsan við at velja tey bestu til viðseting, og skal tað tá brátt vísa seg, at ross okkara kann blíva dugandi til tað, vit krevja av tí.

Reinaling hevur tað framm um blandingsaling, at hon er tryggari og útsetur ikki eigarin fyri so nógv tap, tí avkomið fær tá í arv júst tey sermerkir og eginskapir, sum staðið og viðurskiftini bjóða tí, og krýatúrini eftir einari slíkari aling blíva, júst sum viðurskiftini á staðnum gera tey; ganga viðurskiftini á staðnum brádliga upp ella niður, fylgja krýatúrini við.

At bøta um krýatúralingina við reinaling, verður tí bara at velja tey bestu krýatúrini til viðseting, og geva teimum eina betri uppaling.

Júst at siga, hvat av tí almenna eigur at gerast fyri at fremja reinaling av okkara egna rossaslagi, vildi ført ov langt, men her skal nevnast, at vit eiga at krevja, at reinaling og blandingsaling fyrst mugu stillast líka, altso, at tað almenna kostar pening uppá roynd við reinaling, sum tað hevur gjørt við blandingsalingina; fyrst og fremst at veita peningastudning til teir, sum hava góð føroysk ross, fyri at fremja hug teirra fyri málinum, soleiðis sum nevnt í skrivilsi frá løgtinginum til útvegaran av hesum blaði, og síðani keypa inn nøkur av teimum bestu rossum, sum eru at finna, og gera væl við tey.

Javnsíðis við arbeiðið frá almenna, má eisini virkast við orð og talu millum bøndurnar, so teir fáa eyga á, at her er ein landasak, ein sak av miklari týðing fyri Førja jarðabrúk.

□